# Oljuprísirnir eru eitt spark í skinnabeinið

**- Um eingin fór í holt við nakað í Føroyum, sum hevur við fiskivinnu at gera uttan so, at vissa frammanundan var fyri, at raksturin í somu løtu fekst at hanga saman, høvdu vit onga fiskivinnu havt í Føroyum í dag. So einfalt er tað, sigur Poul Hansen, nevndarformaður í nýggja samtakinum**

Vilmund Jacobsen

Poul Hansen, advokatur og vinnulívsmaður, er sera spentur upp á stóru avbjóðingina sum nevndarformaður í nýggja og stóra samtakinum, sum nú hevur lagt til brots í føroyskari fiskivinnu, bæði á sjógvi og landi.

- Tað er gleðiligt, at tey seks skipini, sum eru í samtakinum, nú hava loyst, og tað næsta verður at lata nøkur av virkjunum uppaftur.

Poul Hansen sigur seg hava góðar vónir um raksturin, men hann ásannar, at tað mangan hevur verið trupult hjá heimaflotanum, eins tað eisini hevur verið trupult at fáa góðan raksturin í fiskavirkini á landi.

- Men vit trúgva upp á, at hetta fer at lata seg gera, leggur hann aftrat.

## Spark í beinið

Nevndarformaðurin ásannar, at tað er eitt spark í skinnabeinið fyri skiparaksturin, at bunkringarprísirnir á olju eru so høgir í løtuni, men hetta er nakað, sum fiskifloti noyðist at liva við.

– Seinnu árini hava vit sæð rættiliga høgar oljuprísir, og síðan eru teir lækkaðir aftur. Beint í løtuni er ivaleyst rættiliga trupult at spáa um, hvør gongdin verður, men vit vóna sjálvandi, at prísirnir ikki gerast hægri enn, at teir verða at liva við.

Poul Hansen ásannar, at nýggju sáttmálarnir, sum gjørdir eru millum manningarfeløg og reiðarar hála í rætta endan, soleiðis at nakrar krónur minni skulu gjaldast út, nú hýrurnar eru lækkaðar eitt vet, samstundis sum manningin luttekur í oljuútreiðslum, tá bunkringarliturin á olju fer upp um eitt ávíst krónutal.

- Jú, alt ger mun, og tað ger hetta eisini, leggur hann aftrat.

Nevndarformaðurin fegnast tó um, at upsaveiðan tykist vera góð í løtuni, og hetta er eisini besta tíð.

- Eg fegnist eisini um góðu upsaprísirnar, sum vit helst ongantíð hava sæð betri áður. So, vit kunnu siga, at her eru bæði døpur skýggj, men eisini glottar.

## Ein trúgv

Spurdur, um nýggja samtakið væntar, at alt virksemið fer at geva avlop longu hetta fyrsta árið, sigur Poul Hansen, at tað sjálvsagt er torført at meta um, men sjálvandi verður stílað fram ímóti hesum.

- Um eingin fór í holt við nakað í Føroyum, sum hevur við fiskivinnu at gera uttan so, at vissa frammanundan var fyri, at raksturin í somu løtu fekst at hanga saman, høvdu vit onga fiskivinnu havt í Føroyum í dag. So einfalt er tað, sigur hann.

Hann vísir á, at føroysk skipavinna í heimasjógvi og føroysk fiskaframleiðsla mangan hevur hingið tungt í sjónum.

- Hinvegin eigur eingin at ivast í, at hóast hesa gongd, skapar henda vinna nógvar ringvirkningar og leggur soleiðis nógv eftir seg í kring um í landinum. Avleiddu vinnurnar av fiskivinnuni skriva sínar rokningar fyri sína tænastu, um vit kunnu siga, meðan bæði skip og virkir mugu fyrihalda seg til marknaðin, sigur Poul Hansen.

## Í blóðinum

Tá pápin er Aksel Hansen, sum í mong ár fekst við vinnulív, hevur tað upp gjøgnum árini eisini verið luturin hjá nýggja formanninum í stóra samtakinum, at ferðast eftir bryggjukantinum.

- Mær hevur altíð dámað hetta umhvørvið væl, og haldi, at tað er ein serligur hugni at ferðast eftir bryggjukantinum og síggja menn stákast umborð og á bryggjuni við sítt virksemi.

Poul Hansen ásannar, at hesin parturin av føroyskum vinnulívi meiri og minni er komin inn við móðurmjólkini – ella liggur í blóðinum, sum vit eisini plaga at siga.

- Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna, og vit ætla okkum í nýggja felagnum at trimma alt so væl, sum til ber, og so vóna vit eisini, at tíðin verður við okkum, soleiðis at vit fáa eina góða og sunna fyritøku, sigur hann.

## Runavík og Toftir

Nú tey seks skipini hava loyst, fer nýggja samtakið at hyggja upp á virkini, sum felagið hevur í Runavík, Toftum og Vestmanna.

Sambært Poul Hansen bendir alt á, at felagið í fyrsta lagi fer at lata fiskavirkið í Runavík og fiskavirkið á Toftum uppaftur, og tað ganga ikki nógvar virkur, áðrenn hesi virkir eru komin upp at koyra aftur.

- Eg vænti, at hesi bæði virkini eru opin aftur, áðrenn ein mánaði er umliðin, sigur nevndarformaðurin.

vilmund@sosialurin.fo



*- Tað er gleðiligt, at tey seks skipini, sum eru í samtakinum, nú hava loyst, og tað næsta verður at lata nøkur av virkjunum uppaftur, sigur Poul Hansen*


**TØKK**

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi, abbi og bróðir okkara

**Niels á Krákusteini**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prestarnar, sangarar, organistar og tøkk til Lailu Højgaard fyri vakran sang í kirkjuni.
Tøkk til tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum. Tøkk til HB fyri góða hjálp.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Krabbameinsfelagið.
Tøkk til øll, sum fylgdu Niels til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.
Tað fløvar at vita, at so nógv hugsa um okkum í hesi sváru tíð.

*Familjunnar vegna*
**Eyrith**
**Conny, Ronni, Tonni og Hildibjørg**



Listagluggin ART GALLERIE NÝGGJ FRAMSÝNING FRÍGGJADAGIN 25/02 KL. 15.00

týs. - frí..........15.00 - 17.30
leyg:...............11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !

**Fríggjadagin 25 februar kl. 15.00 letur upp framsýning í Listaglugganum, Dr.Jakobsensgøta 15.**

Framsýningin er sett upp sum ein blandað framsýning við nýggjum og gomlum listaverkum, eftir fleiri av okkara kendastu listafólkum sum, Ingálvi av Reyni, S.J.Mikines, Hans Hansen, Waagstein, Z.Heinesen, E av Reyni, Torbjørn Olsen, Kára Svensson, Olivur við Neyst, Astri Luihn o.fl.

Vit søknast eftir verkum eftir t.d. Kruse, Kristin í Geil, Steffan Danielsen, I av reyni, Mikines, Heinesen, Waagstein, Glerfoss. Sum heild hava verk, eftir virkand listafólk eisini áhuga!



Torbjørn Olsen
2008



I av Reyni
2001

**Listagluggin**
Dr. Jakobsensgøta 15 · Tórshavn · Tlf. 32 20 22 · Fartlf. 51 00 22 · listagluggin@hotmail.com · www.listagluggin.com